# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Hetta er teirra heim




**- Tað er altíð gott, tá ein er komin so langt við einum húsum, sigur Fróði Danielsen á Strondum.**

**Týsdagin vóru hann og tríggir handverk-arar hansara í ferð við at reisa eini nýggj sethús á Hálsagøtu, ovarlaga í bygdini**

SETHÚS
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Væl gongur at fáa sperrurnar upp. Merkið er longu vundið á stong*
*Mynd: Høgni Thomsen*



*- Fólk vilja fegin hava okkurt sum hini ikki hava, sigur Fróði Danielsen, byggimeistari*
*Mynd: Høgni Thomsen*

**Strendur:** Sólin skínur oman og niðan henda fyrra-partin.

Tað er kortini nakað kalt í veðrinum og eitt sindur av vindi, men menninir her sansa tí neyvan. Teir eru meiri upptiknir enn so við spennandi arbeiði teirra.

Ein góðan mánað framm-anundan vóru teir byrjaðir uppá arbeiðið at byggja hesi sethúsini, og nú var komið so langt, at fyrsta stigið var rokkið: Tær seinastu sperrurnar vórðu settar upp.

Við hjálp av einum last-bili við krana vóru tær sett-ar uppá pláss - ein fyri og onnur eftir. Og nakað fyri døgurða varð tann seinasta sett í og fest.

Hetta skuldi sum vera man markerast, og tí var Merkið fest á stong. Men teir ídnu handverkararnir høvdu ikki tíð at steðga við hetta. Arbeiðið mátti halda fram við somu ferð.

- Vit byrjaðu fyri einum mánaði síðani. Og gongur tað soleiðis tað gongur beint nú, verða vit lidnir um einar tveir mánaðir, sigur Fróði Danielsen við Sosialin.

Tíðin til tíðindafólkini er avmarkað, tí tað er eyðsæð, at fyri Fróða og hansara menn er tað av alstórum týdningi at húsini verða liðug til tíðina.

## Okkurt serstakt við húsinum

Hesi sethúsini standa á Hálsagøtu, og koma at hava eitt ótrúliga vakurt útsýni yvir Skálafjørðin og suður-eftir.

Teir byrjaðu fyri einum mánaði síðani uppá hesi húsini, sum verða 150 fer-metrar til støddar og koma haraftrat at hava eitt bilhús uppá 40 fermetrar.

Tá talan er um sethús, eru ynskini hjá fólki altíð sera ymisk. Her ræður um hjá byggifyritøkuni at fylgja hesum ynskjum og koma við hentum ráðum.

Fróði plagar vanliga at tekna sethúsini sjálvur, men so eru tað eisini tey, ið ynskja onnur at gera hetta. Tað var júst dømið við hes-um húsunum, sum nú vórðu reist.

- Tað er EM-ráðgeving sum hevur teknað húsini, greiðir Fróði frá.

Eitt sum sermerkir hesi húsini - og forrestin fleiri onnur í gøtuni - er ein kar-nappur. Tað vísir seg at hetta er væl dámt av fólki.

- Ja, vit síggja tað greitt, at fólk leggja dent á at hava okkurt, sum onnur ikki hava, sigur hann við einum brosi.

## Hetta er teirra munn

Tað er týðiligt, at hetta er ikki fyrstu ferð at menn seta sperrur upp.

Skjótt er at fáa sperrurnar festar og tryggjaðar, soleiðis at tær ikki skulu fara nakran veg um vindur brádliga skuldi komið.

- Eftir tað fara vit at tróðra, og síðani verður far-ið undir at inniloka tey, sigur Fróði.

Her er talan um eini lykla-klár hús, men teir hjá Fróða eru kortini liðiligir: Fólkini vilja sleppa at mála innan, og tað verður sjálvandi eftir-líkað teimum.

Aftaná koma teir so og festa loftslistarnar og gera tað sum restar í. Hetta eru kundarnir glaðir fyri og hetta er eisini nakað sum Fróði leggur stóran dent á.

- Tað er týdningarmikið, at fólk sleppa at avgera sjálvi, hvussu alt skal gerast. Eg meini, - hetta er hóast alt teirra heim. Og hetta skulu tey brúka restina av lívinum at gjalda niður uppá.

- Tí kann ein ikki bara seta tey til síðis. Tey mugu eisini hava eitt orð at siga, sigur Fróði.

## Álítandi

Tá Fróði og hansara menn eru lidnir við hetta húsið, eru onnur sum bíða eftir teimum: Ein virkisbygn-ingur sum m.a. skal klæðast av nýggjum og skifta vind-eyguni út.

Teir hava í størstan mun arbeitt aðrastaðni enn á Strondum, og eru hetta fyrstu húsini í bygdini. Teir hava m.a. arbeitt á Kambs-dali, Runavík og í Søldar-firði, men ongatíð í Havn.

- Eg royni ikki at taka ov nógv arbeiði niðurfyri. Tað er so skjótt at prísurin kann broytast, tá ein hevur givið eitt bindandi tilboð, og so hongur ein bara uppá tað.

- Vit fáa fyrispurningar í heilum, men tá vit bert eru tríggir mans er ikki lætt at átaka sær tey stóru arbeiðini.

- Okkara fremsta mál er at verða álítandi. Tað skal verða okkara vørumerki, sigur hann.

> *Hetta er teirra heim. Og hetta skulu tey brúka restina av lívinum at gjalda niður uppá. Tí kann ein ikki bara seta tey til síðis. Tey mugu eisini hava eitt orð at siga*

> *Tað er púra vón-leyst at fáa hand-verkarar í dag. Vit hava roynt leingi, men uttan úrslit*

## Ringt at fáa hand-verkarar

- Tað er púra vónleyst at fáa handverkarar í dag. Vit hava roynt leingi, men uttan úrslit, sigur Fróði Danielsen.

Í løtuni hevur hann tríggjar mans aftrat sær, og teir ger hann alt fyri at varðveita í arbeiðinum.

Hetta er ikki lætt, tí tað eru so nógvir aðrir sum eru í somu støðu. Fyri mangar er ikki ann-að at gera enn at kapp-bjóða um lønina.

Sjálvur hevði Fróði ein mann uppá hondina her-fyri, men hesin fór aðra-staðni at arbeiða.

- Eg bjóðaði honum 140 krónur um tíman, men hann segði neitakk. So tú skilir, at tað er ikki lætt at fáa handverkarar, sigur hann.

## Fjarðastevnan 07

Um vikuskiftið er Strendur vertur fyri ársins Fjarða-stevnu.

Sosialurin fer hesa vik-una at seta fokus á bygdina, fólkið og sjálvandi tað, ið hevur við stevnuna at gera.

Vit fara m.a. at hitta ein arbeiðsformann, ein eldri útróðrarmann, borgarstjór-an og ein av samskiparun-um av stevnuni.